FISKIVEIÐIEFTIRLITIÐ
Faroe Islands Fisheries Inspection

**1. stýrimaður til Fiskiveiðieftirlitið**

Eitt starv sum 1. stýrimaður við skipunum hjá Fiskiveiðieftirlitinum, verður hervið lýst leyst, til setan skjótast gjørligt.

**Starvið fevnir m. a. um hesar uppgávur:**

- Ganga vakt eftir vaktarskipan, sum skiparin fyriskipar.
- Luttaka í dagliga arbeiðinum.
- Arbeiðsuppgávur sambært starvslýsing í Góðsku- og tyrgdarhondbókini.
- Annað fyrifallandi arbeiði

**Førleikakrøv:**

- Útbúgving sum skipsførari.
- Vinnubræv sum stýrimaður við handilsskipum á 3. stigi(STCW-regl. II/1 as Watchkeeping Officer).
- Heilsuváttan fyri sjómenn.
- Góðan førleika at samskifta á føroyskum, norðurlenskum og enskum máli.
- Góð samstarvsevni og hegni at fyriskipa.
- Aldur og heilsu til at gerast kavari. Fyrimunir men ikki krav.

**Setanartreytir:**
Starvið er tænastumannastarv og lønt í 28. lønarflokki sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarandi yrkisfelag.
Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og deildir/stovnar undir tí, umframt hini aðalráðini og Løgmansskrivstovuna.
Tænastustaðurin í løtuni er Fiskiveiðieftirlitið.

Starvsheiti er 1. stýrimaður.

Tann ið settur verður, má kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Skrivlig umsókn við: **CV, avrit av prógvum fyri førleikakrøv og møguligum viðmælum**, skulu vera Fiskiveiðieftirlitinum í hendi í seinasta lagi 12. september 2007 kl. 1400.

Umsóknirnar skulu sendast til :

**Fiskiveiðieftirlitið, postsmoga 347,**
**110 Tórshavn.**

*Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Fiskiveiðieftirlitið tlf. 31 10 65 og tosa við Jóannes Heimustovu, samskipara.*



SUNDA KOMMUNA

## Kunngerð

um broyting í byggisamtyktini fyri Hósvík

Við heimild í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 13. mai 1997, verður við hesum boðað frá, at Sunda kommuna á bygdaráðsfundi tann 27.08.2007 hevur samtykt, at gera niðanfyristandandi broytingar í byggisamtyktini fyri Hósvík.

**Broytingin umfatar matr. nr. 38.**
Matr. nr. 38 verður broytt frá G-øki (frílendi ) til A- øki (bústaðarøki).

Broytingin liggjur frammi til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni í vanligari skrivstovutíð

**Frá 30. august til 20. september 2007 báðir dagar íroknaðir**

Møgulig mótmæli og/ella broytingaruppskot, sum skulu vera skrivlig, skulu vera Sunda kommuna í hendi í **seinasta lagi 30. november 2007.**

**Sunda kommuna**
Oyrarbakkavegur 3
Postboks 10
400 Oyrarbakki



## Temadagur um epilepsi verður hildin á Hotel Hafnia

**7. september 2007 kl. 9.30 – 16.00**

*við Bjarka á Rógvi Hansen og Joan Højgaard, neurologum.*

**Skráin verður hendan:**

***Fyrrapart (2½ tíma við ½ tíma steðgi)***
1. Hvat er epilepsi?
2. Hví fær ein epilepsi?
3. Hvør fær epilepsi?
4. Hvørji sløg av epilepsiherðindum eru?
5. Hvussu verður ein kannaður fyri epilepsi?
6. Einaferð epilepsi, altíð epilepsi?

***Kl. 12.00 – 13.00 Døgurðasteðgur ca. 1 tíma***

**Seinnapart (2½ tíma við ½ tíma steðgi)**
7. Víst verða ymisk epilepsiherðindi á video.
8. Vit fáa eina nágreiniliga frágreiðing um: Er tað ikki epilepsi, hvat er tað so?
9. Hvat hendir tá ein verður kannaður á eini "Epilepsiklinik":
   a. Hvat hevur læknin veruliga áhuga í?
   b. Hvørjar kanningar verða gjørdar.
   c. Hvussu kann hetta ávirka epilepsi-diagnosuna?

*Møguleiki verður at seta spurningar.*

Hesin temadagur er ætlaður øllum við epilepsi, limum, fólki í sjúkrahúsverkinum, heimarøktini, skúlar, stuðlum undir stuðulsfólkaskipanini o.l., lærarum, pedagogum og annars øllum, ið hava áhuga í hesum fyrilestrum.

Tilmelding til temadagin er galdandi við at ringja á tlf.: 263078 (Randfríð Sørensen), **innan mánadagin 03.09.2007 kl. 20.00.** *(Best um ringt verður eftir kl. 16.00 vanligar dagar).*

**Kostnaðurin er kr. 500,00** fyri hvønn luttakara, og kann upphæddin flytast á **Postgiro, nr. 70.548** ella í **P/F Eik Banka, nr. 174.413.7.** Í prísinum er ein góður døgurði á Hotel Hafnia í døgurðasteðginum.

***Avmarkað luttøka!***



Dansifelagið Fragdin Hósvík

Byrja verður at dansa sunnukvøldið 30. september í bygdarhúsinum í Hósvík.

Byrjunarholdið kl. 18-20
Vand kl. 19-21

Nyggir limir ið duga at dansa vals og foxtrot eru hjartaliga vælkomnir

Dansiskeiðið 07/08 kostar kr. 600,- við limagjaldi

Tilmelding á tlf.
422291 ella 265844



Dansifelagið Fragdin



Nýt teorikursus
på dansk
til personbil

Begynder 4. september
Tilmelding på tel. 216021

KOYRI FRÁLÆRA
21 60 21



Lesið Sosialin - so eru tit við

